Útróðrarmenn hjá Nordafar:

# Løgdu nógv fyri í Føroyingahavnini

Fyrsta stóra føroyska flakavirkið var í Føroyingahavnini. Har fingu nógvir menn sína upplæring í flakavinnu, og flakavirkið hjá Nordafar var fyrimynd fyri fleiri av teimum flakavirkjum, sum komu í Føroyum í sekstiárunum. Fløkini vórðu seld til Bretlands og USA, og frystiskip sigldu í beinleiðis rutu úr Føroyingahavnini til amerikanskar havnir við fiskinum.

Føroyskir útróðrarmenn lótu vøruna. Teir vóru hesi árini í Føroyingahavnini í stórum tali og róðu út við innstalleringum og deksførum. Tey fyrru árini fóru bátarnir ikki so langt úr Føroyingahavnini, men sum fráleið løgdu teir alt fjarari leiðir undir seg, og menn fóru at byggja sær størri bátar, skrivar Jógvan Arge í nýggju bók síni Teir tóku land nr. 6.

Tá Tórstein Christiansen í Skálavík í 1962 ætlaði sær at fara í Føroyingahavnina at rógva út, var honum greitt, at teir fóru ikki at klára seg við einum tíggjumannafari. Teir høvdu verið í Holsteinsborg árið fyri og komu altíð aftur við fullum báti. Nú fingu teir Marjus Clementsen á Sandi at byggja sær seksæringin "Grindafoss".

Tað var so skjótt, at hvørt mansbarn í Føroyum kendist við hetta navn. Væl lá fyri hjá "Grindafossi" at fáa fisk, og longu fyrsta árið í Føroyingahavnini var hann bestur. Navnið fekk báturin eftir einum fossi í Skálavík, har Tórstein plagdi at fanga síl sum smádrongur.

Men tað gekk onki í fyrstani. Fyrstu ferð høvdu teir verið úti í í tríggjar dagar og fingu bara 700 pund. Hinir bátarnir høvdu 4-6000 pund. Tá gekk prátið á keiini, at synd var í hesum nýkomnu skálvíkingunum, sum høvdu bygt sær dýran bát og ongan fisk fingu.

Men Tórstein og menn hansara bóðu hinar ikki hugsa um seg. Teir skuldu nokk klára seg.

*Grafitti í Føroyingahavnini*

*Tórstein Christiansen í Skálavík*

## "Gigan" brendi í fisk

"Grindafossur" var 32 føtur. Hetta sama árið komu grønlandsbátar, sum vóru upp aftur størri. Karl Jespersen á Tvøroyri bygdi "Giguna" í Punthavnini við Trongisvágsfjørð. Hon bleiv so yvirstór, men var eitt eiggiligt sprek, segði Karl. "Gigan" var 36 føtur langur og góðar 10 breiður.

Ein dagin brendu teir í fisk 18 fjórðingar norðanfyri Kookoyggjarnar og fyltu bátin á tremur. Tað var ikki meir, enn stavnarnir á honum komu undan, tá teir sigldu suðureftir, segði ein, sum sá Karl dansa av frøi afturí í rong, meðan hann sigldi til avreiðingar. Veiðan vá 19.300 pund.

Hetta var stórsta veiða í Grønlandi tá eftir so stuttari tíð, men "Gigan" var so tungur bátur, tá hann var lastaður, at motorurin helt ikki til stríðið, og teir fingu stórar trupulleikar av honum fyrsta summarið. Endin var, at teir noyddust at skifta hann út. "Sannheitin var, at man var ov fátækur og hevði ikki ráð at keypa tann rætta motorin beinanvegin", segði Karl Jespersen.

## "Sildin" ein fót longri

Ein av kappingarneytunum hjá "Grindafossi" og "Giguni" var seksæringurin "Sildin" úr Svínoy. Hetta var ein grønlandsbátur, sum Bjarni Jacobsen hevði smíðað beiggja sínum Helga. Báturin var gjørdur í túninum hjá Bjarna í Klaksvík. "Sildin" var 37 føtur langur og 11 breiður, so hann var eina tonn størri enn "Gigan".

Edward í Svínoy var við synum sínum við "Sildini". Hann hevði róð nógv út frá skipi í Grønlandi, tá hann var bestimaður á "Polo". Hann hevði onkur mið norðuri við Kookoyggjarnar, og tá hann hevði lagt nakrar ferðir, raktu teir við nógvan fisk við Bákoynna norðanfyri Kookoyggjarnar. Har lógu teir so javnan og fyltu seg.

Einaferð høvdu teir fylt so nógv í "Sildina", at hon drakk í ødrum borðinum, tá teir fóru at sigla. Teir kruvdu á heimferðini, og tá teir komu til landingar, var hálvtannað borð frítt. Hetta fyrsta summarið var "Sildin" í harðari kapping við "Grindafoss" um at vera bestur, men hon bleiv eitt hálvt tons styttri enn skálvíkingarnir.

## Útróðrarbátar úr Klaksvík

Deksbátar avreiddu eisini til Nordafar. Teir vóru heldur longri úti enn maskinbátarnir - upp í einar fimm-seks dagar. Summir nýttu høvið til at landa í Føroyingahavnini sunnudag, tí tá fiskaðu teir ikki kortini.

Deksbátarnir vóru "Eysturhøvdi" og "Ørvur" úr Klaksvík og "Hoyvík" og "Glottin" úr Havn. Havnarmenn og skálvíkingar høvdu keypt "Glottan" úr Klaksvík til hendan fiskiskapin. Teir høvdu havt so góðar royndir við "Hoyvík" hjá Virgari Frýdal árið fyri.

Hesir stóru bátarnir royndu víða. Stundum vóru teir sunnanfyri Ísblinkin, stundum norðuri í Dýpinum. Bestur bleiv "Eysturhøvdi", sum William Joensen var skipari á. Teir avreiddu 210 tons í Føroyingahavnini. Jóhan Petersen í Norðdepli var bestimaður.

Í 1963 fóru klaksvíkingar til Grønlands við flutningsskipinum "Poppy". Ísak Matras var skipari. Eins og "Pollur" og ein rúgva av ødrum deksførum avreiddu "Poppy" í Føroyingahavnini, og hon bleiv best hetta summarið. Teir avreiddu omanfyri 300 tons. Meginpartin av fiskinum fingu teir á Fylla Banka. Eina viku fingu teir 45 tons har.

Yvirhøvur var árið 1963 slakari hjá deksbátunum, og nú fóru teir eisini at fækka í Grønlandi.

## Njarðlingur saknaður

"Njarðlingur" var við aftur hetta árið, og hann fylgdist heim við "Polli". Hann fekk eina dramatiska heimferð, tí teir mistu róðrið á ferðini. Manningini eydnaðist at rigga eitt neyðróður til við stampum og tunnum, og "Njarðlingur" vann upp land, men fólk vóru bangin um hann, tí hann svaraði ongari radiostøð, sum kallaði á hann.

Einaferð kallaði hann so sjálvur á Tórshavn Radio, og gátan var loyst. Tá hann nærkaðist Føroyum, avgjørdi løgmaður at senda vaktarskipið Víking ímóti honum.

22 K 35 23


# ítróttur

Nr. 227 • fríggjadagur • 23. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


## Støðan 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 7 | 5 - 2 - 0 | 201 | 185 | 16 | 12 |
| 2 | VÍF | 6 | 5 - 1 - 0 | 179 | 140 | 39 | 11 |
| 3 | H71 | 7 | 4 - 0 - 3 | 190 | 189 | 1 | 8 |
| 4 | StÍF | 7 | 3 - 1 - 3 | 193 | 190 | 3 | 7 |
| 5 | Tjaldur | 7 | 2 - 1 - 4 | 165 | 176 | -11 | 5 |
| 6 | KÍF | 7 | 1 - 1 - 5 | 171 | 198 | -27 | 3 |
| 7 | Kyndil | 7 | 1 - 0 - 6 | 161 | 182 | -21 | 2 |

StÍF-Neistin 34-34 (18-18):

# Gevið okkum fleiri slíkar

**StÍF og Neistin spældu ein sera undirhaldandi dyst á Skála mikukvøldið, har spenningurin alla tíðina var í hásætinum. Javnleikurin merkir tó í løtuni, at tað vóru strandingar, sum fingu meira burtur úr dystinum**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Lagt var upp til ein spennandi dyst, tá tvey av fremstu liðunum í føroyskum hondbólti hittust á Skála mikukvøldið.

StÍF er í løtuni verjandi steypavinnari, og seinnu árini hevur liðið átt eitt fast pláss í hondbóltsoddinum, har teir við eyðkenda ferðmikla hondbóltinum hava verið partur í fleiri av mest undirhaldandi dystunum her á landi.

Mótstøðuliðið, Neistin, hevur aftur í ár eitt sera sterkt lið, og verða teir bláu av mongum mettir sum einastu veruligi avbjóðararnir hjá VÍF í gulldystinum. Nakað, sum kanska eisini varð undirstrikað í javnleikinum í toppdystinum herfyri.

## Mansverjurnar munaðu

Hesa ferð var neistaliðið tó eitt sindur skert, tí Heini Joensen noyddist at sita leikbannaður uttanfyri, og fyrstu løtuna av dystinum tóktist hetta eisini at órógva liðið nakað.

Álopsspælinum tørvaði skothóttanir av bakkinum, og tá verjan so heldur ikki var nakað at rópa hurrá fyri, vóru tað vertirnir, sum fingu ta nógv betri byrjanina.

Eitt time-out og eftirfylgjandi mansverja av Costin Dumitrescu fekk tó betri skil á Neistaspælið. Mansverjan skerdi stóran part av álopsvápninum hjá heimaliðnum, og í álopsspælinum fekk liðið nú ferðina upp á eitt støði, sum teir vanliga ikki hava. Kanska júst tí spælið vanliga er bygt kring skothóttanina frá Heina.

Hetta var eisini nakað, sum gav Jacob Jónsson høvi til at sýna, hví hann framvegis verður mettur sum ein hin besti spælarin í landinum. Bæði tá talan var um gjøgnumbrot og frístælingar var Jacob maðurin, sum Neistin setti álitið á, og um miðjan hálvleikin høvdu gestirnir eisin togað sig upp á javnt.

Stórspælið frá íslendingunum fekk somuleiðis heimaliðið til at fara undir mansverju, men nú tóktist veruligt glið vera komið á Neistan. Ikki minst viðførdi støðan við fimm móti fimm, at lættari varð at finna rásarúm í verjuni, og serstakliga Kári Mortensen og Hans Áki Dal-Christiansen dugdu at gera sær dælt av hesum.

Neistin var mest sum á veg burtur frá heimaliðnum, men stutt undan steðginum fingu teir tvær útvísingar á rað, og so leikaði aftur meira javnt á.

## Óneyðugar útvísingar

Hetta við útvísingum skuldi eisini vísa seg at gerast eitt eyðkenni fyri neistaliðið hendan dystin. Ikki færri enn tríggjar ferðir noyddust teir at spæla við tveimum monnum í undirtali, og hóast teir bláu helst vilja vera við, at onkrar av hesum vóru heldur bíligar, so skerst ikki burtur, at fleiri eisini vóru heilt óneyðugar, og tað var kanska fyrst og fremst hetta, sum kostaði teimum sigurin.

Tað var nevnliga soleiðís í seinna hálvleiki, at Neistin fyri ein stóran part royndi at stríða seg inn aftur á strandingarnar, eftir at hesir høvdu vunnið sær fyrimun í yvirtalsstøðum. Át fyrimunurin hjá strandingum so ikki gjørdist enn størri kann Neistin bara takka Peturi Magnusson fyri, tá hesin einar tvær ferðir mest sum á rað bjargaði í ein móti einum støðum.

## Mundi vent

Sum dysturin leið, so sá alt meira út til, at heimaliðið alla tíðina skuldi halda fast um leiðsluna. Hinvegin sat tað eisini í høvdinum, at Neistin longu tríggjar ferðir í ár hevur vunnið við máli í evstu løtu, og tá teir hálvan tríðja minutt fyri leiklok fyri fyrstu ferð í seinna hálvleiki komu á odda, kom hesin varhuga aftur.

Tað eydnaðist tó aftur heimaliðnum at koma á odda, og við kontra máli skutu teir seg aftur framum. Neistin javnaði, men við knøppum minutti eftir á talvuni, hevði StÍF nú allar fyrimunir.

Neistin kundi sum so ikki brúka javnleikin til nakað, tí royndu teir nú at taka strandingar langt úti á vøllinum, men men tað gjørdi so hvørki frá ella til. Nøkur einsamøll fríkøst vórðu úrslitið, og eitt slíkt varð eisini seinasta hendingin í dystinum, men við seks bláum monnum framman fyri sær, kundi Costin ikki hótta málið nakað stórvegis.

## Stabiliteturin væntar

Sum sagt, so kundi Neistin sum so ikki nýta úrslitið til nakað sum helst. Teir hava longu leikt ein javnleik í grundspælinum, so hesin merkti í veruleikanum ein stigamiss í mun til oddaliðið úr Vestmanna.

Strandingar fáa hinvegn – um teir ikki spæla aðrar javnleikir – fulla úrtøku fyri javnleikin, og hesin prógvar eisini, at teir hava evnini til at blanda seg í oddastríðið.

Stóri trupulleikin hjá teimum tykist tó at vera væntandi stabiliteturin, sum hevur eyðmerkt liðið higartil. Kanska er hetta ein avleiðing av fótbóltinum, sum órógvaði fyrireikingarnar í stóran mun, men um so er, so er helst meira í væntu frá teirra síðu í endaspælinum.

Undir øllum umstøðum mugu føroyskir hondbóltsáskoðarar vóna, at StÍF – og sum so øll onnur í landinum – verða partur av fleiri slíkum dystum framyvir. Talan var ikki um teir heilt nógvu áskoðararnar inni á Skála, men tey, sum vóru, fingu so í øllum førum fullan valuta fyri pengarnar.

*Stóra drívmegin á Neistaliðnum mikukvøldið var Jacob Jónsson, sum var við í stórum parti av skapandi spælinum hjá teimum bláu*

## Dysturin í tølum

**StÍF-Neistin 34-34 (18-18)**

Málskjúttar:
StÍF: Costin Dumitrescu 11(3), Artur Johansen 8, Leivur Justinussen 6, Bent Djurhuus 4, André Danielsen 2, Sveinur Justinussen 1, Marius Joensen 1
Neistin: Hans Áki Dal-Christiansen 9(3), Kári Mortensen 8, Jacob Jónsson 5(1), John Petersen 4, Ári Rouch 3, Ragnar Stakksund 2, Áki Mørk 2, Karl Oddmar Rasmussen 1
Brotskøst: StÍF 3, Neistin 6
Útvísingar: StÍF 2, Neistin 8
Dómarar úr Tjaldri: Kári Hansen & Trúgvi Mortensen. Hildu sum so gott skil á dystinum, men nakrar hampuliga stórar villur vóru eisini at síggja.